# TÍTT HÁR – TÍN SAMLEIKI!










Mánakvøldið skipaði Frisørheilsølan við Elnu Strøm fyri einum hárshowi uppi á Hotel Føroyum. Her vóru tveir danir frá L´Oreal sum vístu føroyskum frisørum tað nýggjasta nýggja. Planet var til staðar.

**Rókur Jákupsson Jakobsen**
**rokur@sosialurin.fo**

Nú er tað staðfest – hárið á okkara skalla er ikki bara til at hita heilan um veturin. Nei, vit hava hár fyri at gerast enn vakrari. Hetta fekk eg staðfest, tá ið eg mánakvøldið dittaði mær niðan á Hotel Føroyar, har ið Frisør Heilsølan við Elnu Strøm helt eitt frisør skeið, sum vísti fram tað nýggjasta nýggja innan litir og klipping.

**Vit lita gerandisdagin**
Tað fyrsta eg legði merki til, tá eg sessaðist til skeiðið, er at eg hevði so nógv tað ljótasta hárið í rúminum. Sjálvur havi ongantíð verið serliga ónøgdur við mítt look, men nú kendi eg meg knappliga ófantaligan. Ikki hugsaði eg somikið langt, at eg kanska átti at sett mær hárið, áðrenn eg fór niðan á frisørskeið. Og tað gjørdi eg heldur ikki, og nú mátti eg bara liva við fylgjunum. Frisørarnir sum komu á skeið, høvdu vakurt og spennandi hár, og her sat neyðars eg, við mínum ógreidda heysi.

So byrjaði tað. Ein dani (sum eitur Lars) greiddi okkum frá um eina nýggja hárliting. Vøran er so ótrúlig, at hon litar hárið heilt inn í kjarnina á hárinum, soleiðis at hárlitingin faktiskt er mennandi, sunn og góð fyri hár okkara. Hetta var tann nýggjasta nýggja vøran frá L´Oreal, sum Lars fortaldi okkum um. Hann gav fleiri vísindaligar frágreiðingar uppá, hví henda liting er so góð – vit sóu m.a. filmar, sum vísti okkum hvussu molikylini finna saman, tá ið hárið kemur í samband við hesa hárliting. "Heilt ófatiligt", hugsaði eg, meðan eg innast inni staðfesti, at eg ikki skilti petti av tí heila.

Men hesin danin staðfesti eisini nakað annað. Hann fortaldi okkum, at frisørar ikki longur kunnu liva av at klippa fólki. Tað eru ikki nóg nógvir pengar í tí. Teir veruligi pengarnir eru at finna í liting, greiddi hann frá. Um frisørar lita hárið hjá einum kunda so mikið væl, at kundin gerst sera nøgdur við litin, so verður kundin bundin at frisørinum. Og um hann verður bundin at frisørinum, so kemur kundin aftur o.s.fr.

Litirnir, sum eru kul í dag, eru heitir og blankir litir. Hárið kann vera myrkt sum ljóst, bara tað verður lagt okkurt heitt og blankt í hárið. Eg legði til merkis, at reytt var ein gjøgnumgangandi litur ið var vístur fram á skeiðinum.

**Mótin?**
Ein annar dani var eisini til staðar. Hann eitur Finn. Hann stóð uppi á einum palli og klipti nøkrum damum. Meðan hann klipti damunum, greiddi hann frá, hvussu honum dámar at klippa hár. Hann segði, at í dag vilja kundarnir fegnir hava, at har er rørilsi í hárinum. Men tað má ikki fella yvir í tað óróliga – heldur skal hárið hava ein struktur sum heldur tí uppi.

Alt hetta, sum hann stóð og fortaldi um, vísti hann okkum á teimum modellum, sum hann klipti. Tær frisyrir, ið hann gav teimum, vóru ikki serliga flipputtar. Tað vóru rættiliga reinar og einfaldar frisyrur, sum eru lættar at seta. Soleiðis vil nútímans kundin hava tað, og tað mugu frisørar virða, greiddi hann frá, meðan saksurin ferðaðist um oyrini á damunum.

Eftir skeiðið fekk eg mær eitt prát við teir báðar Finn og Lars. Eg undraðist á, hvussu mannfólk skuldu síggja út í dag, tí fyri mær ljóðaði tað, sum um teir bara prátaðu um, hvussu konufólk eiga at síggja út. So tað var upplagt hjá mær at spyrja teir um, hvat eg skal gera, tá eg skal til jólaborð. Hvussu skal eg seta mítt hár? "Tú skal fara inn á baðirúmið. Vend ryggin til spegilið, set hárið sum tú kennir at tað eigur at sita og far so útaftur uttan at hyggja eftir tí", greiddi Lars frá. Tað er so týdningarmikið, at hárið er uppsett, men tað skal síggja tilvildarligt út. Serliga hjá mannfólki, tí at tað er ikki so mansligt at seta hárið alt for nógv, halda teir báðir.

Hvussu er so við mótanum? Kunnu vit siga nakað um, hvagar hann er á veg? "Tað er ógviliga torført at siga nakað generelt um mótan", segði Finn. Tí at mótin í dag er so individuellir, og øll vilja gjarna víkja frá tí "vanliga". Vit vilja hava okkara egna stíl, sum gevur okkum ein samleika, og tí er tað vónleyst at siga nakað generelt um mótan. "Hárið er títt – tað er tín samleiki!"